Tórshavn, 5. desember 2018

**Til arbeiðsbólkin at viðgera og eftirmeta skipanina í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi**

Eftir seinasta fund okkara, har vit viðgjørdu tilmælið frá Havstovuni um fiskidagar fyri 2019, fari eg at skjóta upp hesa semju um arbeiðsætlan frameftir og skipan fyri botnfiskiskapin í føroyskum sjógvi fyri 2019.

Hugsanin er, at vit fyri 2019 taka stig ávegis ímóti eini semju um umsitingarætlanir fyri botnfiskiskapin undir Føroyum.

1. Arbeiðsbólkurin heldur fram við sínum arbeiði. Bólkurin greinar arbeiðssetningin nærri. Miðað verður eftir, at hava eitt uppskot til frágreiðing og umsitingarætlanir liðugt 15. mars 2019.

2. Fiskidagaskipanin heldur fram í 2019.

3. Fyri 2019 verða við støði í tilmæli frá Havstovuni gjørdar hesar broytingar í skipanini:

   a) Friðingarnar fyri ungfiskaleiðir, sum Havstovan hevur í sínum tilmæli, verða framdar í samstarvi og hoyring við vinnuna. Talan er m.a. um tvær av somu leiðum, ið vórðu friðaðar frá juli 2011 til august 2013, onnur eystur úr Fugloynni og hin vestur úr Mykinesi.

   b) Fleiri fiskiveiðiroyndir verða í samstarvi millum Havstovuna og vinnuna gjørdar á Føroya Banka í 2019.

   c) Fiskidagatalið verður lækkað 10% í øllum bólkum. Eftir hesum verður dagatalið í hvørjum bólki í 2019 hetta:

| | |
|---|---|
| Bólkur 2: Trolarar: | |
| Innara fiskidagaleið: | 3.947 |
| Ytra fiskidagaleið: | 1.377 |
| Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons: | 1.826 |
| Bólkur 4 A: Útróðrarbátar millum 15-40 tons | 773 |
| Bólkur 4 B: Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu | 1.191 |
| Bólkur 4 T: Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu | 1.060 |
| Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu | 7.991 |

   d) Reglurnar um avhending av fiskidøgum verða broyttar soleiðis, at í 2019 kunnu upp í 20% av egnum fiskidøgum avhendast øðrum rættindahavara í sama bólki. Hetta merkir, at í 2019 verður treytin um, at tú skalt hava brúkt 60% av døgunum árið fyri, fyri at kunna avhenda, ikki galdandi.

Høgni Hoydal
landsstýrismaður